HEILSANIR



Góði elskaði sonur
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 30-ára degnum. Má Harrin signa framtíð tína.
Kærar heilsur mamma og babba

Góða dóttir, systir, svigerinda, vm.
Hjartaliga tillukku við tí runda degnum. Minnist tú hesa ferðina??
Familjan

Øllum tykkum mongu, sum gleddu meg á seksti ára degnum, takki eg hjartaliga. Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit, uppringingar og sangir. Og tykkum sum bakaðu og annars á annan hátt hjálptu til.
Kærar heilsur Edda Gaard, Vágur

Góði Òla Christian
Hjartaliga tillukku við 30-ára degnum. Nú kenni eg ein piparsvein, sum ynskir sær sooo lekkur konufólkabein.....
Heilsan stórasysti

Góði elskaði mamba
Hjartaliga tillukku við degnum...Vit eru sooo góðar við teg...
Sissal og Savannah

Til Rúna í Jansagerði í Viborg
Góði Rúni. Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 6. mars. Gleði meg at síggja teg í Skanneborg til føðingardag 11. mars. Takk fyri alt tú hevur verið fyri meg.
Heilsan mamma

Hey, hey !!!
Vit skulu giftast 12. apríl vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 15.00 og veitslan verður í Leguhúsinum í Nesvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, verða biðin at siga frá á tel. 505075 ella 514699 í seinasta lagi 1. apríl.
Rakul Rasmussen, Argir og Kristian Niclasen, Tórshavn

Góði elskaði Olle-Bolle
Vit systkin ynskja tær hjartaliga tillukku við 30-ára degnum. Gleða okkum til ballið...
Beinta, Herborg og Benny

Góði stóribeiggi Òla Christina
Tillukku við tí stóra degnum...Vit síggjast í kvøld...
Heilsan Benny

Góði Símun
Tillukku við 4 ára degnum. Eisini ein heilsan til Jónu. Gleði meg at síggja tykkum aftur.
Tær kærastu heilsanir Jónar gubbin

Góða elskaða Femja
Nú ert tú blvin ein stór didda. Hjartaliga tillukku við degnum tann 5. mars. Jesus pápi signi framtíð tína.
Heilsan omma, abbi, Jean-Alex og Benjamin

Sosialurin

Heilsanir

kr. 30,-

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: _____

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____ Tlf.: _____

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

Góði allar-kerasti beiggi
Hjartaliga tillukku við 30-ára degnum... Vóni tú fært eitt ógloymandi kvøld...
Kærar heilsanir lítlasysti



Góði fitti elskaði babba
hjartaliga tillukku við 30 ára degnum.
Allerbestu heilsanir Bartal og Sóley